Til veitarar

Almannaverkið tørvar nýggjan buss til í minsta lagið tveir koyristólsbrúkarar.

Meginreglan er at allir bilar hjá landinum skulu verða el drivnir, og tað halda vit okkum til. Vísir tað seg, ikki at bera til at fáa ein nøktandi el drivnan, so hevur bensin/diesel áhuga. Almannaverkið biðjur tí veitarar um geva tilboð uppá el-, bensin og diesel buss.

Treytirnar eru fylgjandi

- Bussurin skal nýtast í samband við borgarar sum fáa eina tænastu frá Almannaverkinum skulu koyrast. Í minsta lagið tveir koyristólsbrúkarar skulu brúka bilin samstundis
- Bussurin skal veitast umbygdur við lyft aftan, sum er egnaður til koyristólsbrúkarar
- Bussurin skal hava møguleika fyri at blíva umbygdur á verkstað, til bert at hava einkult setur aftan
- Bussurin skal hava tvey einkult setur framman, t.v.s. ikki sofa
- Bussurin skal eisini nýtast til at koyra millum bygdir í øllum veðri, og tí skal bilurin verða egnaður til tað. Her verður hugsa um motorkraft og koyrieginleikar
- Støddin á bussinum skal verða H2 og L3
- Levering: Bussurin skal leverast Almannaverkinum, seinast í 2025
- Litur: Bussurin skal verða hvítur ella koksgráður/myrkagráur
- MVG, virðisgjald og skrásetingar upphædd skal upplýsast

Keyparin tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu tilboðini eins og ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum.

Upplýsast skal, at tað kann henda at Almannaverkið hevur tørv á fleiri bilum tá ið vit taka av tilboð, og tá tilskilar Almannaverkið sær rætt til at keypa fleiri bilar, uttan at tað verður boðið út av nýggjum.

Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keypara. Niðurstøðan um, hvat av tilboðunum – um nakað – tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi.

Almannaverkið ynskir at royna bilin innan avgerð verður tikin. Hetta fyri at kunna meta um besta bilin.

Sum meginregla leggur Almannaverkið seg eftir at keypa bíligasta bilin. Tó loyva vit okkum, at taka av einum dýrari bili, um Almannaverkið fyri ein minni prísmun fær ein betur bil, í mun til góðsku og endamál.

Soleiðis vera tilboðini vektaði:

- Prísur 60 %
- Egnaður til endamál 20 %
- Góðska 20%

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ávís viðurskifti ynskjast greinað nærri. Slíkir spurningar skulu so vítt møguligt verða settir fram og annars viðgjørdir skrivliga við tí fyri eyga lættari at kunna skjalprógva samskiftið.

Spurningar skulu vera skrivligir og sendast til janusf@av.fo.  Spurninganir verða síðani viðgjørdir og svaraðir í seinasta lagi mánadagin 6. oktobur 2025 kl. 10.00. Øll, sum hava latið tilboð inn, fáa svar um niðurstøðuna av spurning. Keypari metir seg kunna geva svar, um tikið verður av tilboðnum ella ikki, umleið 1-2 vikur, eftir at tilboðsfreistin er farin.

Tilboðini skulu verða Almannaverkinum í hendi í seinasta lagi mikudagin 8. oktobur. 2025 kl. 10.00

Tilboðið skal sendast við telduposti til janusf@av.fo